## Vilja hava meginfelag

Grønlendska fiski- og veiðimannafelagið KNAPK skýtur nú upp at stovna eitt meginfelag, sum skal umfata øll feløgini í fiskivinnuni, og sum skal standa fyri samskiftinum millum vinnuna og myndugleikarnar. Formaðurin í KNAPK, Leif Fontain, ásannar, at tey ymsu feløgini í fiskivinnuni kunnu hava ymisk áhugamál, men hann heldur kortini, at tað eigur at bera til at samansjóða sjónarmiðini í einum meginfelagi. Í grønlendska arbeiðsgevarafelagnum halda tey hugskotið um eitt meginfelag fyri fiskivinnuna vera áhugavert, skrivar KNR.



## Tíma ikki til Danmarkar

Danmark er eftir øllum at døma ikki so væl umtókt sum ferðamannaland longur. Tøl, sum JyllandsPosturin hevur hugt eftir, vísa, at í 2009 vóru tær útlendsku gistingarnar tvær milliónir færri enn í 2008. Gongdin tað seinasta tíggju ára skeiðið vísir, at í fjør vóru 4,6 milliónir færri útlendskar gistingar enn í 1999. Frá 200 til 2008 var minkingin 11 prosent, og tað er bara Kýpros, sum hevur havt størri minking í útlendskum gistingum, skrivar JyllandsPosturin. Samstundis vísa tølini, at teir útlendsku gestirnir eru ikki so vanligir í eitt nú Norðurjyllandi longur, men at halda seg nærri teimum størru býunum.

# Treisknari parturin vinnur

**Hvørki Fíggjarmálaráðið ella Starvsmannafelagið hava gjørt nakra nýggja roynd at loysa stríðið hjá portørunum, sum eru í verkfalli. Báðir partar bíða eftir hvør øðrum. Tað er ein spurningur, hvør boygnar fyrst, sum Snorri Fjalsbak, stjóri á lønardeildini tekur til**



*Skitin klæðir og burturkast hópa seg upp, og tað verður meira og meira, sum dagarnir ganga*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Ellivu dagar eru nú farnir, síðan flestu portørarnir í landinum fóru í verkfall, og enn er eingin glotti fat hóma fyri eini semju.

Snorri Fjalsbak, stjóri á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum sigur, at hann hevur um at seta seg í samband við Starvsmannafelagið.

Vit hava opið kríggj, og tað er ein spurningur um, hvør boyggir seg fyrst.

Hann sigur, at hann hevur tosað við leiðslan á Landssjúkrahúsinum, men av sjúkrahúsinum er enn eingin áheitan komin til hansara um at taka stig til at loysa ósemjuna.

Hann veit væl, at skitin klæðir og burturkast hópar seg upp á deildunum á Landssjúkrahúsinum, men tað má so vera, sigur Snorri Fjalsbak.

Í J. C. Schrøtersgøtu 9 í Havn situr Selma Ellingsgaard, forkvinna í Starvsmannafelagnum og bíðar.

Vit bara bíða, og sum eg havi sagt áður, leypa vit avstað, um vit verða boðin til fundar.

Hon sigur, at tey í Starvsmannafelagnum eru hørm um, at tað skuldi enda við verkfalli, men tey kundu ikki á nakran hátt semjast.

Verkfall er okkara vápn, sum vit bara brúka, tá ið tað er hægst neyðugt, og tað var tað hesa ferð, sigur Selma Ellingsgaard.

Hon er greið yvir, at støðan á Landssjúkrahúsinum er alt annað enn góð, og ti vónar hon, at onkur vaknar og vil geva portørunum meira í løn.

Selma Ellingsgaard finst ikki at landsstýrinum fyri at hava verið við Gjógv í tveir dagar, meðan portørarnir hava verið í verkfalli.

Eg taki tað sum eina sjálvfylgju, at landsstýrið eisini á fundinum hevur tosað um hesi viðurskiftini, sigur Selma Ellingsgaard.

Hon rósar annars Benta Wallenberg, virkandi stjóri á Landssjúkrahúsinum fyri dugnaskap og fyri at vera góð at samstarva við.

## Litavarnir sita framvegis

**Varðhaldsfongslingin av tveimum litavum, sum tiknir vórðu 13. november, eftir at teir vóru komnir til Føroya við sterkum rúsevnum í bilinum, er longd eina ferð enn við fýra vikum**

RÚSEVNI

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað er drúgt, tá ið politiið kannar tey stóru rúsevnismálini.

Tveir menn, sum vórðu tiknir 13. november og varðhaldsfongslaðir dagin eftir, sita framvegis í varðhaldinum. Mánadagin varð varðhaldsfongslingin longd við fýra vikum aftrat.

Men nú vænti eg ikki, tað verður so leingi aftrat, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini hjá politinum.

Menninir eru litavar og ávikavist 24 og 22 ára gamlir. Teir komu til Føroya við Norrøn u, og av tí at tollararnir høvdu illgruna um rúsevni, varð bilurin kannaður væl og virðiliga. Kanningin var so drúgv, sluppu menninir ikki víðari við ferjuni til Íslands, hagar teir ætlaðu sær.

Í fyrsta umfari funnu tollararnir einki í bilinum, men nakað seinni varð hald lagt á bilin, sum varð pilkaður sundur, og tá vórðu rúsevnini funnin.

Líka síðan 14. november hava teir báðir menninir sitið avbyrgdir í hvør sínum kliva. Mánadagin avgjørdi rætturin, at teir skulu sita avbygdir í tvær vikur aftrat. Hinar báðar vikurnar kunnu teir vera saman við øðrum í varðhaldinum.

Menninir nokta seg sekar og siga, at teir koyrdu ikki rúsevnini í bilin, sum teir eru skuldsettir fyri at hava gjørt.

Av tí at menninir nokta seg sekar, og kravið helst verður fongsul í meira enn fýra ár, kann tað henda, at menninir koma fyri nevningating.

# Myndirnar vekja gomlu minni

**Fólkini, sum higartil hava vitjað myndaframsýningina í Skálanum í Klaksvík, hava hjálpt væl til við at seta nøvn á**





FRAMSÝNING

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tað eru serliga fólk oman fyri 60 ár, ið fáa nógv burtur úr at vitja myndaframsýningina, sum í hesum døgum er í Skálanum í Klaksvík.

Hetta er myndir, sum tiknar vórðu í Thule Bókhandli og hava ligið í húsinum síðan. Nú eigur Betesda húsið.

Allar myndirnar eru gjørdar av glasplátum, og felags fyri tær er, at tær eru væl varðveittar, ikki ein skøva í nakrari mynd.

Myndirnar ganga fram til 1956, tá glaspláturnar vórðu avloystar av filmi. Av tí at mydnirnar eru so gamlar, eru tað serliga tey tilkomnu, sum kenna fólk aftur. Tey yngru kunnu tó síggja líkheitir, og eisini ber til at hyggja eftir klædnadraktum, hármóta og øðrum.

Flestu myndirnar eru av familjum og børnum, sum hava verið hjá fotografi. Onkrar passmyndir eru, próvmyndir og floksmyndir. Nakrar myndir eru eldri, avmyndaðar til bøkur ella annað.

Magna Thomassen og Hanna Hansen, sum báðar eru úr Klaksvík, hava sett framsýningina upp.

Magna Thomassen sigur, at flestu fólkini, sum vitja, geva sær góðar stundir, og tað skal eisini minst ein tíma til at hyggja eftir øllum myndunum.

Fólk standa saman og hyggja. Í fleiri førum var einki navn un dir myndunum, men tey, sum hava vitjað, hava hjálpt væl til við at seta nøvn á. Fólk hava eisini verið ófør við at fara víðari, ringja og spyrja og eru so komin aftur við nøvnunum.

Framsýningin verður opin fram til hósdagin, hvønn dag frá klokkan 16 til 20.